## Tvingsilssøla

**Fríggjadagin 24. mars 2006, kl. 13.00,** verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin **tvingsilssøla** yvir **matr. nr. 659, Klaksvík.**

Ognin er ein virkisbygningur, til støddar 347 m2. Grundøkið er uppá 402 m2. Bygningurin er klæddur við timbri og taktur við tjørupappi. Bygningurin er í tveimum hæddum, stovuhædd 205 m2 og loftshædd 142 m2 og innrættaður soleiðis:

**Niðara hæddin:** Stórt felags høli við barr og barrdiski.

Høvuðsinngongd til dur, gongd og tvey wc.

**Ovara hæddin:** Felags høli. Skrivstova/fundarhøli. Billiardrúm og lítil barr.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur verður fríggjadagin tann 10. mars 2006, kl. 13.00.

Sølan er umbiðin av **Óla Jákup Kristoffersen, advokati. Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145, e-mail** ojk@jura.fo **(sak nr. 20050844)** ið kann geva nærri upplýsingar og útflýggja tvingsilssøluuppstilling, og sum nærri avtla kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

**Føroya Fútarættur**
tann 13. februar 2006




ADVOKAT VIRKIÐ

# Ítróttarklæði og -útgerð til hægstbjóðandi

Úr búnum Sp/f Sohvel undir konkurs selja vit nakrar flytikassar og pappeskjur við ymsum ítróttarklæðum og ítróttarútgerð. Talan er um fimm 7-8 flytikassar 43x43x62 cm. 3-4 pappeskjur og nakað av leysum.

**Nevnast kann:**
60 pør av gaggum UMBRo, støddir frá ca. 36 til ca. 47.
20-25 pør av gaggum KELME, ymsar støddir.
11 pør av gaggum KAPPA, ymsar støddir.
6 pør joggingskógvar MAZURO
50 stórar ítróttartaskur ERREA, myrkar
10 JAKO troyggjur, hvítar og bláar
26 JAKO venjingardraktir, bordeaux/svartar, 8 merktar B68
18 JAKO venjingarjakkar, bláir
50 ymisk ítróttarpløgg ERREA Italian Tecnical Sportswear
18 JAKO t-shirts, bordeaux og bláar
15 MIKASA venjingardraktir og -troyggjur
Ein eskja og ein plastikkposi við svimjibrillum, JAKO stuttar buksur, JAKO knickers, jakkar, taskur. Blusur t-shirts, ein flytieskja við málmanshandskum og skinnarum, ein flytieskja við ymsari coachhjálp so sum ísi, liniment o.l., ein pappeskja og ein svartur plastikkposi við akslatrøum og 3 eskjur við óspecifiseraðum pløggum av ymsum slag so sum jakkar, buksur, blusur, shorts og t-shirts.

Vørurnar eru nýggjar (óbrúktar). Alt verður selt undir einum. Selt verður til tann, sum hevur hægsta boð

**mánadagin 20. februar 2006, kl. 10.00**

Ongin fær at vita, hvat annar hevur boðið.

Vørurnar skulu avheintast beinanvegin á skrivstovu okkara, og gjaldast skal beinanvegin. Av tí at talan er um sølu úr konkursbúgvi, er sølan treytað av, at tann, sum keypir, frásigur sær allan rætt til at koma aftur um aftur.

Tikið verður bert móti skrivligum boðum gjøgnum e-post ella telefax:

E-post: advokatvirkid@advokatrvirkid.fo
Telefax: 315874

Kurator
Sigmund Poulsen, adv.

**Advokatvirkið**

**Páll Nielsen, adv.** **Eyðhild Skaalum, adv.**
**Sigmund Poulsen, adv.** **Hans Trygvi Teirin, adv.**
Skansavegur 1 · Postsmoga 85 · 110 Tórshavn
tlf. 312171 · telefax 315874
e-post: advokatvirkid@advokatvirkid.fo

P/f POUL MICHELSEN

## GOYMSLUSTJÓRI

Vit sóknast eftir einum ágrýtnum og røskum fólki at hava ábyrgdina og dagligu leiðsluna av okkara goymslu og útkoyring.

Starvið sum goymslustjóri inniber í høvuðsheitum at:

- Fyriskipa alt arbeiðið á goymsluni
- Gera arbeiðsætlanir fyri goymslufólkini og bilførararnar
- Hava ábyrgd av goymslufólkunum og gera lønaravtalur
- Hava ábyrgd av, at allir ordrar verða avgreiddir og gjørdir klárir til útkoyring
- Samskifta við føroyskar kundar í samband við vøruútkoyringina
- Samskifta við føroyskar veitarar í samband við vørumóttøkuna

Starvið er spennandi og skiftandi, men eisini rættiliga umfatandi og krevst tí, at umsøkjarin hevur yvirlits- og fyriskipanareginleikar. Dámar tær avbjóðingar, og sóknast tú eftir einum góðum og tryggum starvi, vilja vit fegin koma í samband við teg.

Lønin verður ásett sambært avtalu, og goymslustjórin hevur tilvísing til leiðsluna.

Vinarliga vend tær til Poul Michelsen ella Gunnar Mohr á tlf. 314650, um spurningar ella ivamál eru.

Skrivlig umsókn kann sendast til:
P/f Poul Michelsen, Postrúm 200, FO-110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 25. februar, og ætlanin er, at tú byrjar skjótast gjørligt.

**P/f Poul Michelsen**

*P/f Poul Michelsen ella bara PM, sum heilsølan ofta verður nevnd millum manna, varð stovnað í 1974. PM er í dag førandi heilsøla innan sítt virkisøki og hevur kundar kring alt landið. Virksemið er í støðugum vøkstri, og tí verður vørumóttøku- og vøruútkoyringsparturin av goymslubygninginum í løtuni bygdur út. Ætlanin er eisini í næstum at byggja goymsluna meira út. PM er skipað í 5 deildir: Sølu-, innkeyps-, fíggjar-, goymslu- og útkoyringsdeild. Á goymsluni og í útkoyringini starvast íalt 15 fólk. Hjá PM starvast íalt 50 fólk.*

# Bústaðarpakki og leigulóg:

# Limafundur um bústaðarviðurskifti -

## verður í Miðlahúsinum

## mikukvøldið

## 15. februar kl 19.30

**Landsstýris-, løgtings- og býráðsumoboð leggja fyri**

## Møti fjølment

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo